DAGSINS MEINING

Høpisleys raðfesting

Seinastu dagarnar hevur sjónvarpið rættuliga varpað ljós yvir syndarligu støðuna, sum valdar á eldraøkinum. Rættiliga hugvekjandi at síggja, hvussu illa sperd nógv fólk eru, sum ikki vita síni livandi ráð, tí samfelagið ikki kann ella ikki vil hjálpa teimum, sum eru komin illa fyri av gomlum fólki, ið tørva hjálp samdøgrið alt. Tað var flott av Finnbjørg og Bjarna Skaalum á Argjum at stíga fram, so fólk – og ikki minst okkara politikarar – kunnu síggja, hvussu illa tað veruliga stendur til á eldraøkinum. Tøkk fái tey fyri tað!

Men spyrjandi kunnu vit so venda huginum at rikna politikkinum: Ikki eitt einasta røktarheimspláss er komið, síðani hendan samgongan tók við. Í degi og viku hóskvøldið sóu vit Helenu Dam á Neystabø í oktober 1999 greiða frá gyltu ætlanum, landsstýrið hevði, um allar kanningarnar, tey høvdu gjørt, og hvat tey ætlaðu sær at gera. Men hvat kom burturúr? Einki. Púrt einki.

Fólkið kann bara standa spyrjandi… Hvat er tað fyri eitt samfelag, sum vit eru í ferð við at skapa í Føroyum? Er tað eitt samfelag við einum dyggum sosialum trygdarneti? Eitt samfelag, ið er skipað eftir tørvinum hjá teimum veiku?

Landsstýrið arbeiðir við hægri málum. Okkara kosnu menn og kvinnur, sum sita við maktini, stríðast við at gera landið sjálvbjargið – og tað skal gerast við at loysa frá Danmark!

Tað gongur strúkandi í Føroyum. Pengarnir streyma inn, og Búskaparráðið letur væl at. Landsstýrið ætlar at lækka blokkin 400 milliónir næsta ár, tí vit hava ovmikið av pengum, sum skulu setast í grunn at standa í móti við.

Hví kunnu okkara ráðandi politikarar ikki kalla ein spaka fyri ein spaka? Hví kunnu tey ikki bara siga sum er, at vilja vit hava fullveldi, so mugu vit gjalda prísin – og prísurin er m. a. at:

- Vit skulu sjálvi taka okkum av okkara gomlu, tí vit hava bara ráð til 250 røktarheimspláss, hóast brúk er fyri 650…
- Vit mugu sjálv taka okkum av okkara sálarsjúku – í øllum førum um summarið, tí vit hava ikki ráð at hava tey liggjandi á sjúkrahúsi…
- Flestu okkara, sum eiga børn, skulu sjálv ansa teimum, tí vit hava ikki ráð at nøkta tørvin á dagstovnaplássum…
- Vit mugu taka til takkar við einum illa sperdum skúla, har lærarar og næmingar mugu húsast við tí sum er, tí vit hava ikki ráð til ein dýran skúla – eftir donskum leisti – har dreingir læra at binda grýtulappar…

Vit kunnu sjálvandi halda á at reksa upp mál, ið landsstýrið roynir at skúgva til viks til frama fyri fullveldinum. Eitt tað fyrsta, sum nýggi mentamálaráðharrin segði alment var, at vit mugu ikki blanda saman vantandi pengar til skúlaverkið og minkandi blokkstuðul!

Men hvør er so trupulleikin, Palliba? Sum er vanta pengar, og loysnin hjá landsstýrinum er at minka blokkstuðulin, so verður betur í Føroyum…?

At fáa fullveldi er eitt val, sum Føroya fólk skal taka. Velja vit tað, fáa vit tað. Landsstýrið hevur ikki fingið undirtøku fyri fullveldinum – enn. Er prísurin lækkað vælferð, so er at egna við tí – og um tað er hetta samfelagið, fólkið vil hava, so vinnur landsstýrið ljóð fyri sínum politikki. Men kallið ein spaka ein spaka!

Sosialurin

VIÐMERKING

Nationalisma tryggjar onga vælferð

Dan R. Petersen
javnaðarmaður

Viðmerking til grein hjá F. Helmsdal 16.06.01.

Skrivingin hjá fullveldisfólki gerst meira og meira desperat, sum valið nærkast. Ragstrarróp, parolur og brigsl. Og nú fleyt so tað súra bikarið hjá Finni Helmsdal yvir. Løgið at Finnur skal kenna so lítið til nýggjari politiska søgu. Eg kann ikki hugsa mær, at hann við vilja manipolerar lesaran. Hann tykist ikki at minnast bert 15 ár aftur í tíðina, tá hann viðger tey famøsu 80-áini. Lesarar, men ikki Finnur, vita, at Javnaðarflokkurin átti 4 av hesum árum. Hesi 4 árini umsat Tjóðveldisflokkurin fíggjarmál. So Tjóðveldisflokkurin hevur so sanniliga eisini eina fortíð.

Nú meti eg Finn sum ein av teimun heilt fáu samgongumonnum, sum hava eitt lítið sindur av sosialum medviti, havi tí onkuntíð hildið fyri við hann, at hann er í skeivum flokki. Og hann hevur alla orsøk at vera frustreraður. Men aggressiónirnar venda skeivan vegin.

Havandi støðuna í samfelagnum í huga er tað sárt at lesa, at hann beinleiðis ger gjøldur við neyð og elendigheit, sum hann sjálvur málber seg. Tað er ein ævigur sannleiki, at eitt og hvørt samfelag skal metast eftir, hvussu tann veikasti borgarin hevur tað. Og her er tað, at skógvurin hjá Finni klemmar. Tað hevur eydnast teim 18 samgongulimunum at flyta fokus frá neyðini í samfelagnum yvir á eitt fantasifostur sum eitur fullveldi. Nær hevur Høgni Hoyðal ella hansara innantóma ekkó, Anita, viðgjørt t. d. eldrarøkt? Ongantíð!

Neyð og elendigheit, tað er støðan í dag, men tað hevur ongan týðning fyri samgonguna. Fullveldið er málið yvir øllum málum, sum skal loysast. Tað er parolan. So má svíða sum svøllur.

250 gomul hava akuttan tørv á stovnsplássi, og bíðilistin til røktar- og ellisheim var, sambært grein hjá Sigvald Kristiansen lækna desember 1999, 644 gomul og óhjálpin. Og listin er væl longri í dag. Men samgongan letst ikki um vón.

Vaskingin hjá 3–400 pensionistum verður niðurløgd í juli og august. Samgongan letst ikki um vón.

Tey sálarliga sjúku verða tvangsflutt úr sínum heimi í summarferiuni. Sinnisbati mótmælir. Samgongan letst ikki um vón.

Átrokandi tørvur á íbúðum til sálarsjúklingar og menn-ingartarnað og herberg til heimleys. Samgongan letst ikki um vón.

Men hvat ger samgongan so? Jú, hon samlar upp til fullveldi. Finnur hevur alla orsøk at vera frustreraður.

Skjótt skal fullveldissamgongan fyri fólksins dóm. Tað er heilt greitt, at tann kynisman, henda samgonga hevur víst, fer ikki einans at ávirka valúrslitið, men eisini hvønn flokk, Javnaðarflokkurin kann kjósa sær at byggja vælferðarsamfelagið upp aftur saman við.

Nationalistisk rakstrarróp úti í Koltri tryggja onki vælferðarsamfelag.

Eg vóni, at Finnur Helmsdal sá Dag og Viku týskvøldið og hóskvøldið, so samvitskan gerst enn verri.

Seglskip úr Skotlandi vitjar Føroyar

Alba Venturer – sum Ocean Youth Trust Scotland eigur, og sum er venjingarskip hjá skotskum ungdómi kemur á vitjan í Føroyum. Alba Venturer fór úr Kyle of Lochalsh í Skotlandi.

Millum manningina er eisini ein føroyingur, 17 ára gamli viðingurin Rói Abrahamsen.

Ferðin sum nevnist »Nautiska avbjóðingin 2001« verður stuðlað av BP í Bretlandi og BP Exploration (Faroes).

BP heldur túrin vera áhugaverdan, og stutt eftir at ferðin er av, byrjar BP sína egnu áhugaverdu rannsókn á føroyska landgrunninum.

Ferðin til Føroya tekur í minsta lagi tríggjar dagar, og kann koma at seta stór krøv til manningina, um veðrið gerst baldrut. Úr Føroyum verður farið til Hetlands og Suðuroyggjar, áðrenn ferðin endar í Aberdeen 29. juni.

Felagsskapurin Ocean Youth Trust Scotland hevur til endamáls at menna ungdómin og geva honum sjálvsvirðna. Ígjøgnum 28 ár hava fleiri enn 15.500 ungfólk verið til sjós við skipinum hjá felagsskapinum og hava hesi siglt umleið 131.000 sjómíl.

Tey ungu eru við í øllum, sum fyriferst umborð. Tað verið seg í sambandi við seglini, navigatión, reingerð og matgerð. Ferðin gevur ungdóminum møguleika fyri at læra seg sjálvan og onnur at kenna, samstundis sum høvi er at líta á og fremja egnan mátt og førleika.

Alba Venturer verður væntandi á Havnini leygarmorgunin 23. juni.

Mynd av Alba Venturer er á heimasíðuni hjá Ocean Youth Trust Scotland: http://www.oytscotland.org.uk/boat.html

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Hovsa, Hans Pauli

Sjúrður Gullbein

Aftursvar til grein hjá Hans Paula Strøm undir heitinum: "Demokrati er gott — men við tjóðri og múlabandi — tað halda Tjóðveldis- og Fólkaflokkur"

So sást tú ljósið eina ferð afturat, Hans Pauli. Eftir djúptøkna hugsan komst tú eftir, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin tjóðra og múlabinda summi fólk, so at demokratiið í Føroyum verður skeiklað og fæst at fungera eftir teirra høvdi.

Hetta er ein sera álvarslig ákæra, Hans Pauli, og hon krevur góðar grundgevingar, um tað ikki skal vera álvarslig manipulatión frá tínari síðu. Grundgevingar vísir tú eisini á, og ein teirra er, hvussu søgan um Signar á Brúnni er sløkt og burturtøgd. Hvussu tjóðveldispolitikarar hava tjóðrað og múlabundið henda mann, fyri at teir kunnu lumpa fólk við sínum heimagjørda demokratii. Sjálvur sigur tú tað soleiðis: "Demokrati er gott, men altso ikki tá tað snýr seg um ávísar persónar og stovnar, halda tjóðveldis- og fólkaflokspolitikarar. T.d. tá tað snýr seg um Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismann. Ella tíðindablaðið Sosialin, ið prentar hansara egnu orð og sjónarmið".

Góði Hans Pauli. Eg haldi tað vera merkiliga undarligt, at tú sigur hetta, tí so seint sum fyri góðari viku síðani skrivaði Høgni Hoydal í Sosialinum um nettupp demokrati og Signar á Brúnni. Høgni Hoydal skrivar millum annað, at: "Tað er demokratiski rættur hansara at siga tað, sum honum liggur á hjarta." Av ókendum orsøkum eru hesi orðini ikki komin inn í databasuna hjá tær, tí tú fortelur fólki nakað heilt annað. Hví gert tú tað, Hans Pauli? Er tað fyri at fáa tína egnu grein at hanga betur saman, ella hevur tú ikki sæð tað, sum Høgni Hoydal skrivar? Lesur tú ikki Sosialin, Mr. Strøm?

Ein kend ósemja

"Tað er tí at fremja demokrati í verki, ikki bara at eiga rættin at frambera síni sjónarmið, ikki bara at hava møguleikan, men eisini veruliga at brúka rættin, at brúka møguleikan."

Hetta eru føgru orðini hjá Hans Paula um, hvussu ein kann fremja demokrati, og eg fái ikki verðið samdari við hann. Og tað fær Sosialurin heldur ikki, tí henda rætt og henda møguleika hevur blaðið brúkt í ólukkumát í søguni um Signar á Brúnni. Tí tann søgan er als ikki ikki sløkt og burturtøgd. Signar hevur sjálvur borið síni sjónarmið fram einar tríggjar ferðir, og blaðfólk á Sosialinum hava skrivað meira enn 14 greinar um hana. Tann fyrsta í mars 2000 og tann síðsta higartil tann 9. juni 2001. Hetta er meira enn ein grein um mánaðin alla hesa tíð. Og av teimum 14 greinunum hevur helvtin snúð seg antin heilt ella lutvíst um, hvussu Tjóðveldisflokkurin hevur sviknið hetjuna Signar á Brúnni. "Vrakaður av sínum egnu", "Tjóðveldisflokkurin sveik", "Ein reinsaður Signar kennir seg svíktan av sínum egnu" og "Reinsaður — men tapti kortini". Hetta hevur verið meiggjað og kleiggjað í blaðnum í longri tí, alt fyri at tæna tínum kæra demokratii, Hans Pauli.

So álvaratos, tað eru ikki nógv mál, sum hava fingið so nógva umrøðu, sum akkurát málið um Signar á Brúnni. Tað hevur Sosialurin sæð til, og tað hevur hann gjørt rætt. Men grundgevingin hjá tær, at summi ikki fáa sína søgu lýsta, tí at tjóðveldspolitikarar og fólkaflokspolitikarar hava tjóðrað og múlabundið tey, hon heldur ikki, Hans Pauli. Og tað skal hon gera, táið tú kemur við so álvarsligum ákærum.

Nakað annað er so...

...um allar tøkar keldur eru brúktar í søguni um Signar. Sambært Høgna Hoydal eru tær ikki tað, tí í somu grein, sum hann skrivar í Sosialinum fyri góðari viku síðani, sigur hann, at: "Hvørja ferð hevur Sosialurin fingið at vita, at eg ikki ynski at fara í eitt persónsstríð, men um blaðið ynskir at kanna málið og at finna sannleikan, so eru blaðfólkini vælkomin at síggja fundarfrágreiðingar og annars at spyrja øll, sum hava verið við í viðgerðini. Hetta hevur blaðið ikki ynskt, og hevur sostatt ikki fylgt nøkrum journalistiskum reglum um at lýsa eitt mál til fulnar."

Nú fert tú at siga, at eg trúgvi blint upp á Høgna Hoydal, og at alt, sum tann eingilin sigur, er ævigur sannleiki. So naivur ætlaði eg ikki at vera, so tann 14. juni 2001 skrivaði eg Sosialinum eitt teldubræv fyri at vita, um tað var so, sum Høgni Hoydal pástendur. Við einum ávísum illgruna um, at svarið fór at koma heldur seint, (tað er so ikki komið enn), so ringdi eg bara til Sosialin og spurdi um hetta sama. Eg spurdi: "Eru blaðfólkini á Sosialinum boðin at síggja fundarfrágreiðingar um málið um Signar á Brúnni?" Og veitst tú hvat Hans Pauli? Svarið var játtandi (saman við einum dismi av uttanumtosi, sjálvandi). Hví so blaðfólkini á Sosialinum ikki hava tikið av hesum góða tilboði, tað vita einans tey sjálvi, men løgið er tad, heldur tú ikki eisini tað, Hans Pauli? Man tað hava nakað at gera við tey gomlu orð, at sær er hond hollast? Í hesum føri, at sær er javnaðarhond hollast? Hetta er so ikki at stremba eftir hesum góða demokratii, sum tú eftirlýsir.

Ein minni kend ósemja

Trúgvi hvør, ið trúgva vil, ósemjur eru ikki bara millum Signar á Brúnni og Tjóðveldisflokkin, ósemjur eru eisini í Javnaðarflokkinum. So stórar, at onkur hevur meldað seg úr flokkinum. Tað gjørdi t.d. Jógvan Mørkøre, bygdaráðsformaður í Hósvík. Hann takkaði fyri seg, tí hann helt flokkin vera ov konservativan í fulveldismálinum. Men av merkiligum orsøkum hevur Sosialurin ikki verið líka raskur at skriva um hetta mál. Høgni Mohr skrivaði tó eina drúgva grein tann 26. apríl 2000. Hetta var áðrenn, Jógvan Mørkøre takkaði fyri seg. Í greinini sigur bygdaráðsformaðurin millum annað, at: " - Eg hevði lagt stórt arbeiði í flokkin her norðuri, men tað varð feiðað til viks. Nú skuldi eg bara góðtaka harraboð frá Jóannesi Eidesgaard og øðrum høgum persónum um, hvør skuldi vera oddafiskur,...". Í greinini stendur eisini, at: "Jógvan Mørkøre sáar iva um, hvussu samd javnaðarfólk eru. Hetta hóast tað er vanligt, at flokkurin letur almenningin skilja, at landsfundir altíð verða hildnir í sátt og semju. - Nógv av teimum tjóðskaparsinnaðu javnaðarfólkunum hava ikki møtt til landsfund. Tað er sambandsvongurin, sum hevur verið á hesum landsfundum." Stikk denn. Hans Pauli.

Tíverri, so verður "rættturin" og "møguleikin" at fremja demokratiið í verki ikki nýttur í hesum føri. Eitt er, at Jógvan Mørkøre velur at halda lágan profil sjálvur, men heldur ikki blaðfólkið á Sosialinum heldur seg framat. Hví man tað vera, Hans Pauli? Og tá ið Jógvan Mørkøre seinni meldar seg úr Javnaðarflokkinum, er hetta so ófatuliga óviðkomandi fyri allan heim, at Sosialurin ofrar heilar 7 reglur upp á tað! Minni enn eini veðurtíðindi, og síðan er ikki ein skeivur stavur sæddur um tað málið. Hvussu ber tað til, Hans Pauli? Góði, sig mær! Hví fáa trupulleikar í Tjóðveldisflokkinum eina heila greinarað, men trupulleikar í Javnaðarflokkinum bara eina grein + 7 reglur? Heldur tú sjálvur, at Sosialurin her hevur fylgt tínum føgru orðum, at: "Tað er tí at fremja demokrati í verki, ikki bara at eiga rættin at frambera síni sjónarmið, ikki bara at hava møguleikan, men eisini veruliga at brúka rættin, at brúka møguleikan."?

Hví brúktu blaðfólkini á Sosialinum ikki henda rætt og henda møguleika? Var demokratiið kanska óinteressant akkurát tá? Ella lá eitt annað demokrati teimum fremri í huga? Tað, sum verður kallað sosialdemokrati? Eg spyrji bara. Tí um tað er so, so hevur tú gjørt eitt sindur undir teg, hin gamli.

At enda

Tað fær ikki verið annað enn ein almenn hemmiligheit, at tey størstu føroysku bløðini royna at vera Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum til vildar. Eg havi so ikki sæð eina einastu oddagrein í Dimmu ella Sosialinum, sum hevur talað fyri samgonguni. Tað kann heldur ikki vera annað enn staðfest, at samgonguflokkarnir hava ikki havt somu blaðmøguleikar sum andstøðuflokkarnir. Og at hetta skal hava tænt tínum kæra demokratii upp á nakran máta, tað fært tú ongan blaðstjóra at skriva undir uppá, Hans Pauli. Heldur ikki blaðstjóran á Sosialinum. Var tað ikki júst fyri at bøta um hesa demokratisku slagsíðu, at menn tóku stig til Fregnir?